**SKRÁSETING FØROYA**
FELAGSSKRÁSETING

Postboks 264 - 110 Tórshavn - Tlf. +298 35 6010 - Fax +298 35 6015 – T–postur: skr@skraseting.fo

# Íverksetarafeløg (ÍVF)

*Eitt íverksetarafelag kann verða stovnað fyri 1 kr. í byrjunarkapitali. Tó skal felagið í staðin spara upp 25% av árliga yvirskotinum inntil felagskapitalurin og ein serligur tiltakspeningur er 50.000 kr. Íverksetarafeløg eru fevnd av Vinnufelagalógini.*

Íverksetarar kunnu stovna eitt ÍVF við einum felagskapitali, sum er millum 1 kr. og 49.999 kr. Felagið skal hereftir uppbyggja kapitalin í felagnum við at spara upp 25 % av árliga yvirskotinum, inntil felagskapitalurin og ein serligur tiltaksgrunnur til samansparda yvirskotið tilsamans er 50.000 kr. Eftir hetta kann íverksetarafelagið, um smápartahavararnir ynskja tað, verða umskrásett til eitt smápartafelag.

Íverksetarafeløg eru fevnd av Vinnufelagalógini.

## *Týðandi munir á ÍVF og øðrum felagsformum*

Fyrimunurin við einum ÍVF fram um aðrar felagsformar (t.d. Sp/f og P/F) er tað lítla kravið um felagskapital, afturfyri at felagið sparir upp av yvirskotinum. Mótsett møguleikunum í øðrum feløgum, kann inngjaldið av felagskapitalinum (smápartabrøvunum) í einum ÍVF einans vera rindað kontant.

Í mun til einstaklingavirkir, har eigarin ábyrgist óavmarkað fyri skyldurnar hjá einstaklinga-virkinum, ábyrgjast eigarar í íverksetarafeløgum einans við teirra innskoti. Við øðrum orðum, er ábyrgdin fyri skyldurnar hjá íverksetarafeløgum avmarkað til ognina hjá felagnum. Afturfyri skulu íverksetarafeløg gera ársfrásøgn eftir ársroknskaparlógini, og ársfrásøgnin skal latast inn talgilt til Skráseting Føroya. Hetta er ikki galdandi fyri einstaklingavirki.

## *Hvat skal skrásetast?*

Í sambandi við skrásetingina av einum ÍVF, skalt tú lata hesar upplýsingar:

- Navn og møgulig hjánøvn hjá felagnum. “Íverksetarafelag” ella “ÍVF” skal framganga av navninum og hjánavninum. Tú kanst ókeypis taka upp til 5 hjánøvn, sum t.d. kunnu nýtast til at staðseta felagið landafrøðiliga ella til at “branda” felagið mótvegis einum ávísum málbólki. T.d. → Felagsnavn: “Felag ÍVF”. Hjánavn: “Felag Tórshavn ÍVF”.

- Bústað og aðrar kontaktupplýsingar hjá felagnum, umframt nøvn á stovnarum, stjórum, nevndarlimum ella limum í eftirlitsráðnum og møguligum grannskoðara. Um persónarnir hava p-tal ella skrásetingarnummar, skulu hesi upplýsast.
- Dagfesting fyri stovnan, sum skal svara til dagfestingina á stovningarskjalinum.

- Endamálið hjá felagnum.

- Tekningarreglan hjá felagnum, sum lýsir hvør í leiðsluni hevur rætt til at skriva undir vegna felagið og sum harvið kann gera bindandi avtalur vegna felagið í støðum, sum liggja uttanfyri dagliga raksturin hjá felagnum.

- Kapitalin hjá felagnum – t.v.s. tann innskotna kapitalin umframt kursin.

- Roknskaparár, umframt navn hjá grannskoðara, um ikki felagið hevur valt grannskoðan av ársfrásøgn frá.

## *Skjalprógvan*

Tá ið tú stovnar felagið, skal tú leggja við:

- Stovningarskjal við viðtøkum. Um viðtøkurnar ikki eru ein partur av stovningarskjalinum, skulu tær viðleggjast fyri seg. Viðtøkurnar skulu vera dagfestar sama dag sum stovningar-skjalið. Harumframt skal stovnarin ella stovnararnir undirskriva viðtøkurnar og stovningar-skjalið.

- Skjalprógvan av kapitali. Sum skjalprógvan fyri kontantum inngjaldi av felagskapitalinum, kunnu hesir hættir vera nýttir í sambandi við fráboðanina**:**
    - Ein egin-váttan, um felagið verður stovnað við einum felagskapitali á 25.000 kr. ella minni.
    - Ein banki váttar, at kapitalurin er inngoldin á bankakontuna hjá felagnum.
    - Ein advokatur váttar, at kapitalurin er inngoldin á bankakontuna hjá felagnum, eina klientkonto ella finst sum kontantur kassapeningur.
    - Ein grannskoðari váttar, at kapitalurin er inngoldin á bankakontuna hjá felagnum ella at kapitalurin finst sum kassapeningur.

Haraftrat skal útfylt fráboðanarblað fylgja við skjølunum.

Skrásetingargjald á 2.500 kr. umframt 4‰ av innskotspeninginum er fyri skráseting av einum ÍVF. sí kunngerð nr. 87 frá 11. juni 2009 um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.